MIÐVÁGS SÓKNAR KOMMUNA

*Miðvágur - Føroyar*

Miðvág, hin

Viðtøkur fyri Miðvágs Bygdasavn

1.grein

Miðvágs Bygdasavn verður skipað sum kommunalur stovnur og er ogn Miðvágs kommunu.

2.grein

Endamál savnsins er innan Vága sýslu

at savna, skráseta, varðveita og framsýna gripir, sum
   hava siðsøguligan áhuga og savna frásagnir um nýtslu
   og søgu teirra og

at varðveita og umsita ávís føst fornminni, serstakliga
   húsini í Kálvalíð.

3.grein

Savnið verður stjórnað av bygdaráðnum, sum hevur ábyrgdina av rakstrinum og hvussu inntøkurnar verða nýttar. Mál savninum viðvíkjandi verða viðgjørd á vanligum bygdaráðsfundi.

4.grein

Bygdaráðið setur savnsleiðara, sum við hjálp og leiðbeining frá landsantikvarinum og undir eftirliti hansara tekur sær av viðurskiftum savnsins.

Samsýning savnsleiðarans verður ásett av bygdaráðnum og somuleiðis samsýning til hjálparfólk, sum savnsleiðarin í samráð við bygdaráðið tekur sær, tá neyðugt er.

5.grein

Virksemi savnsins verður fíggjað av bygdaráðnum, við ymsum studningi og við studningi úr landskassanum sbr. LL nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

6.grein

Fíggjarárið gongur frá 1. apríl til 31. mars.

viðv. F.L.j.nr. 2204-14-3-1 4

MIÐVÁGS SÓKNAR KOMMUNA
*Miðvágur - Føroyar*

Miðvág, hin

7. grein

Savnsleiðarin førir roknskap savnsins, soleiðis at altíð er lætt at síggja, hvussu fíggjarstøðan er.

Roknskapurin verður grannskoðaður av grannskoðara bygdaráðsins og, tá hann er góðkendur av bygdaráðnum, sendur landsantikvarinum við frágreiðing og skjølum innan 1. juni. Samstundis sendir bygdaráðið eftir uppskoti savnsleiðarans landsantikvarinum rakstrarætlan fyri komandi fíggjarár.

8. grein

Í øllum førum verður farið fram eftir tí sum fyrisett er í LL. nr. 17 frá 9.mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

Soleiðis samtykt á fundi í Miðvágs bygdaráði

tann 3. september 1973.

B. v.

J. A. Joensen

viðv. F.L.j.nr. 2204-14-1 4 8